## Eina vitjan verdur




Í summar var gravgangur eftir ferðaseðlum við Norrønu til Danmarkar. Hetta førdi við sær, at nógv leitaðu sær til Noregs fyri síðani at koyra suður til Kristiansand og sigla til Danmarkar. Hetta er ein frálíkur túrur, sum saktans kann tilmælast. Teinurin úr Bergen til Kristiansand er drúgvur, og tí er gott at gista einaferð á vegnum – t. d. á Stavangerleiðini. Men eru tit á ferð við børnum, so er tað eitt upplivilsi at vitja Djórparkina – har tú umframt djóragarðin eisini kanst uppliva Kardamummubýin í fullari stødd – og síggja sjónleikin við.

## Fólk og dólgar

Bókin snýr seg um tann friðarliga býin Kardamumma og tey, sum búgva har. Nøkur fá skapa trupulleikar. Tað eru teir tríggir dólgarnir Kaspar, Jaspur og Jónatan, sum búgva uttan fyri býin og javnan fara inn í býin fyri at stjala tað, teimum tørvar. At enda verða teir handtiknir, men teir verða væl viðfarnir í geglinum, og í síðsta kapitli verða teir dagsins hetjur, tá teir sløkkja eldin í torninum hjá Tobiasi.



# »Fitt fólk eru lættast at ha

## Kardamumma



Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Tað minti ikki sørt um, tá Elin og Óli ferðastu inn í myndir í barnaútvarpinum í sjeytiárunum at trína innar býarportrið í Kardamummubýnum í Dyreparken í Kristiansand í Noreg**

Í hesi áhugaverdu djóralund læt upp fyri sekstan árum síðani ein ordiligur Kardamummubýur – sum Thorbjørn Egner sjálvur hevur teknað og ímyndað sær. Har eru 32 hús, og summarmánaðirnar spæla tey eisini sjónleikin í túnunum millum húsini og á svalum og uppi í torninum hjá Tobiasi.

Tú sært allar figurarnar úr søguni, og saman við sjónleikinum verða sjálvndi teir so væl kendu sangirnir framførdir. Tú sleppur inn í húsini, og uppi í torninum hjá Tobiasi er útsýni yvir allan býin. Um tú biður um tað í góðari tíð, so ber eisini til at gista í húsunum í Kardamummubýi!

Sporvognurin hjá Sývarson, sum sjálvandi eisini hevur køkukassan við – og bjóðar køkur – koyrir aftur og fram í býnum – júst sum í bókini. Hann hevur bara tvey steðgistøð, eitt í hvørjum enda á býnum.

»Eg hevði havt í huganum – og á pappírinum – ein lítlan hugflogsbý við einum høgum torni og smáum húsum kring tornið – og pálmar og býarportur og ásin í gøtunum – kveikt úr upplivingum úr smáum bygdum í londum kring Miðalhavið.«

Soleiðis sigur Thorbjørn Egner í endurminningum um upprunan til Kardamummubýin.

»Og so fekk eg hug at lata fitt og vinarlig fólk búgva í býnum, tí vinarlig fólk eru lættast at hava við at gera – eisini í bókum. Og soleiðis varð Kardamummubýur til«, sigur Thorbjørn Egner.

Kardamummubýur í Dyreparken í Kristiansand lat upp summarið 1991. Men søgan um býin er nógv eldri enn so – hon byrjar fjøruti ár longur afturi í tíðini.



*Tobias ansar veðrinum uppi í torninum*




*Teir tríggir dólgarnir, Kaspar, Jaspur og Jónatan á veg inn til bakaran at stjala*

Thorbjørn Egner hevur sagt, at hann hevði teknað tornið og helt, at tað átti at verið til onkra nyttu. Tí varð Tobias uppfunnin til at búgva høgt uppi yvir øllum hinum í býnum – og sum ein annar Petur Skeel ansar hann veðrinum í Kardamummubýi. Og í býnum búgva eisini Suffía mostir og lítla Kamomilla, her býr eisini Remo og Tommy og slaktarin og Berg keypmaður og Sývarson vognstjóri. Og her býr fyrst og fremst Bastian politimeistari, sum ongantíð hevur hevur hug at handtaka nakran, men heldur vil skapa veitslu og gleði. Hann hevur eisini gjørt Kardamummulógina, ta einfaldastu av øllum lógum:

*»Tú skalt ikki plága onnur ella gera nakað ilt,*
*annars kanst tú liva, sum tú sjálvur vilt«*

Í Noreg gjørdist søgan um fólk og dólgar víðakend í 1954, tá Thorbjørn Egner sjálvur læs hana í barnaútvarpinum har. Árið eftir kom søgan út í bók.

Føroysk børn – eisini tey vaksnu børnini – kenna søguna frá okkara barnaútvarpi. Eyðun Johannesen týddi bókina og legði hana eisini til rættis sum útvarpsleik – og fyri út við 40 árum síðani kom leikurin eisini út á gramofonplátu. Og hendan plátan man hava snurrað mangar ferðir á plátuspælarum kring alt landið upp gjøgnum sjeytiárini, tí hon var so forkunnug, tí umframt barnarímurnar hjá Hans Andreasi, so var ikki so nógv annað slíkt tilfar til børn.

Men aftur til Thorbjørn Egner. Longu í 1949 var hann á ferð í við Miðalhavið – mest í Marokko men eisini í Spania og á Sicilia. Har hevur hann funnið íblástur til suðurlendsku húsini, sum hann hevur skapt í Kardamummubýi – og hesi eru eisini endurskapt í Kardamummubýi í Kristiansand. Dólgaborgina fann hann tó á Rhodos!

Stjórin í Kristiansand Dyrepark, Edvard Moseid, hevði í fleiri ár tosað um at skapa ein Kardamummubý í fullari stødd í Djóraparkini. Í 1987 fór hann til Thorbjørn Egner við hugskotinum, sum beinanvegin til dystin fús.



Síðani varð farið í gongd. Bjørn Egner, sonur Thorbjørn Egner, sum er arkitektur, fekk ábyrgdina fyri verkætlanini, og hann fór suður til Costa del Sol í Suðurspania at finna íblástur.

Thorbjørn Egner vildi hava eina naturalistiska suðurlendska bygd við skeivum húsum. Hann vildi hava ein einfaldan og barnsligan Kardamummubý.

Øll húsini fingu sína egnu funktión. Býrin varð bygdur á